# Hjálpa børnum í Liberia

**11 ára gamli Sigurd í Homrum skipaði saman við næmingunum í 4. og 5. flokki í Hvalvíkar skúla fyri stuðulstaki, og inn komu 2.357 krónur, sum fara til seks foreldraleys børn í Liberia**

Randi Jacobsen

Tað ávirkar børn í Føroyum at hoyra, at børn í tilaftursettum londum ikki hava tað gott.

Sigurd í Homrum, sum er ellivi ár og gongur í 5. flokki í Hvalvíkar skúla, hevði leingi hugsað um, hvat kundi gera fyri at hjálpa fátøkum børnum, soleiðis at tey eisini kundu gangaí skúla.

- Eg helt tað vera so syund í teimum, sigur Sigurd í Homrum.

Hann tosaði við pápa sín, sum dámdi væl tankan hjá sonum, og pápin segði Sigurdi frá tiltakinum hjá Synergi við at biðja fólk lata eina tímaløn um árið til hjálpiarbeiði.

Teir báðir tosaðu síðan við Hera Jacobsen, lærara hjá Sigurdi, og tað bleiv til, at næmingarnir í 4. Og 5. flokki í Hvalvíkar skúla skipaði fyri diskoteki seinasta hóskvøld.

Inn komu 2.357 krónur, sum Ása Andreassen i Synergi fekk handaðar á samkomu í Hvalvíkar skúla fríggjadagin.

### Skilagóðir næmingar

- Vit hava ongantíð áður upplivað, at ein skúli hevur skipa fyri tiltaki og latið pengarnar til "Ein tíma um árið", sigur Ása Andreassen.

Hon heldur Sigurd vera ein sera skilagóðan drong. Hann segði við hana, at hann kundi hugsað sær at gjørt tað sama aftur næsta ár.

Hinir næmingarnir eiga eisini stóra tøkk og tað sama foreldrini, sum vístu tiltakinum stóra vælvild, sigur Ása Andreassen.

Hon er fegin um, at næmingarnir valdu at lata júst hesum tiltakinum peningin. Peningurin fer óskerdur til seks foreldraleys børn, sum búgva á barnaheiminum hjá ABC barnahjálp í Liberia.

Sum heild fær tiltakið "Ein tímu um árið" verður annars góðan stuðul. Í fjør komu yvir 100.0000 krónur inn.

Í ár letur innsavningin til Rumeniaverkætlanina og til hesi seks foreldraleysum børnini í Libeira.

Børnini fingu eisini stuul í fjør, og tá varð peningur somuleiðis latin eini ommu við sjey ommubørnum í Liberia.



*4. og 5. flokkur megnaðu at savna 2.357 krónur inn*



*11 ára gamli Sigurd í Homrum kom sjálvur við hugskotinum at hjálpa børnum í Liberia at sleppa í skúla*

# Ergo gloppar hurðini

**Eftir ein jaligan fund Heilsumálaráðið umhugsar Ergo at lata terapistovuna uppaftur**

Í januar gavst SP/F Ergo í Havn at veita børnum við serligum tørvi voðgerð.

Hetta hendir, eftir at Aksel Johannsen, táverandi landstýrismaður í heilsumálum arbeiddi við at seta á stovn eitt alment tilboð, sum kundi veita ergoterapi um alt landið. Hetta skuldi koma í staðin fyri prvatu tilboðini.

Beinta Lassen á Ergo vildi ikki lata uppaftur fyri nakrar mánaðir, til tað amenna tilboðið fór at koma.

Men nú er ikki heit vist, at børnini við serligum tørvi, noyðast at bíða eftir almenna tilboðnum.

Beinta Lassen á Ergo hevur nevndiliga verið á fundi við Heilsumálaráðið. Á fundinum kom fram, at eftir at almenna tilboðið er komið, fer framvegis at vera tørvum á privatum tilboðum um ergoterapi.

Á fundinum varð avgjørt, at Ergo skuldi umhugsa støðuna og møguliga lata ergoterapistovuna uppaftur.

Síðan hevur Ergo sent Heilsumálaráðnum tvey uppskot, sum kunnu loysa trupulleikan, so børn kunnu fáa ergoterapi aftur beinanvegin.

John Johannesen, landsstýrismaður kann enn einki siga um uppskotini frá Ergo. Uppskotini verða í fyrsta umfari viðgjørd á embætismannastigi, sigur hann.

